**04-11-09**

# OLE2 á Akureyri

Tey sum arbeiða í verkætlanini OLE2, høvdu møguleika at luttaka á fundi í verkætlanini á Akureyri seinni partin í oktober.



Tilsamans luttóku 9 umboð fyri Føroyar á fundinum, Mary í Garði stjóri á Nærverki við starvsfólki, Óløf Briem hjá Landsapotekaranum, Sveiney Sverrisdóttir skrivari hjá Føroya Kommunufelag, Albert Ó. Ellefsen borgarstjóri og Hans Jørgensen skúlastjóri í  Vága kommunu.

Høvuðsevnið á fundinum var, saman við okkara útlensku partnarum, at planleggja komandi tíðarskeiðið í verkætlanini. Eisini var gegnumgongd gongdini í verkætlanini higartil, við denti á tvørtjóðarliga samstarvið. Fleiri áhugaverdar framløgur vóru, millum annað um Eldra dagarnar í  Vágunumfyrst í oktobur og um eftirlit við medisinering í egna heimi.

Tíð var eisini sett av, til at fáa kunning um lokalt virksemi í teimum ymsu evnunum verkætlanin arbeiðir við, og vit sum arbeiða við Netinum, vitjaðu Rósenborg. Bygningurin var ein fólkaskúli, bygdur í 1930 og teknaður av einum av Íslands førandi arkitektum, ein stásiligur bygningur, sum ikki longur lýkur nútímans krøv innan skúlaverkið , men kann saktans brúkast  til onnur endamál.

Rósenborg er setrið fyri samfelags- og mannrættindadeildina hjá Akureyrar kommunu. Fjølbroytt virksemi fer fram í húsinum, sem hevur undirtitilinn møguleikadepil.

Partur av vikseminum er Punkturin, sum var stovnaður í 1994 og fevndi virksemið fyrst sum frítíðardepil fyri fólk sum søkja arbeiði. Seinri, var Punkturin gjørdur til almennan handverks- og frítíðardepil fyri øll áhugað. Góðar umstøður eru fyri alt slag av ítrivi. Skeið av ymsum slag koyra allar dagar og útboðið veksur í heilum. Dentur er lagdur á at menna íslenskt handverk og gamlar arbeiðshættir.



Til dømis, er tað mest søkta ítrivið træskurður, nágreiniliga ASKUR, sum er eitt ílat frá víkingatíðini, har matur bleiv borðreiddur í.

Talan er um eitt ílat av træ, við perónligum mynstri og gjarna forbókstøvunum hjá eigaranum.

Á myndini tilvinstri arbeiða nakrar fittar damur við leir. Rættiliga fínir lutir tær gjørdu.

Hesar tvær damurnar vildu ikki vita av, at staðið var einans fyri pensionistar.

Tær søgdu frá, at nú gekk svína influensan á Akureyri, men vanliga var best at møta tíðliga fyri at fáa pláss við bindiborðið.

Ítrivini vóru annars ikki ólík teimum í Føroyum. Har var til dømis møguleiki fyri smíð og tøving.



Av framtíðarætlanum hjá Rósenborg, dreyma starvsfólkini um, at fáa yngri ættarliðini inn saman við teimum eldru, men við fíggjarligu støðuni í Íslandi í dag, mugu tey helst bíða eina tíð. Alt kostar pengar.

Saman umtikið eru vit komin heim við íblástri frá øðrum at gera brúk av her heima. Les meira um Rósenborg á www.akureyri.is/Rosenborg/UmSamfelMannrett.

Northern Periphery Programme 2007–2013

Innovatively investing in Europe's Northern Periphery for a sustainable and prosperous future

European Union
European Regional Development Fund